# ES kann ikki leggja seg út í orkupolitikkin hjá londunum

## Danmark hevur fingið eina skipan, sum eisini fer at galda fyri Noreg, um landið gerst limur

Hvørki stjórnin í Keypmannahavn ella EU-nevndin og ráðharraráðið í Bruxelles kunnu leggja seg útí, hvat Føroyar gera við ráevni í føroysku undirgrundini, um føroyskur limaskapur skuldi komið upp á tal í framtíðini.

**Sambært ráevnislógina hevur føroyska heimastýrið fullu ábyrgdina av tí, sum er í undirgrundini, og kann sjálvt lóggeva og umsita, sum tað ynskir.**

Í ræðsluherferðini móti Europeiska Samveldinum verða tvey skrímsl vanliga drigin fram. Annað er, at spaniólar og portugisar koma eftir fiskinum hjá okkum, og hitt er, at EF, ella ES sum tað nú eitur, kemur eftir oljuni.

Nú hevur EU gjørt eitt drúgt oljudirektiv, og hevur tað verið lagt fyri marknaðarnevnd Fólkatingsins. Ein av journalistisku leiðarunum við Danmarks Radio, Henning Schmaltz-Jørgensen, hevur eftir áheitan hiðani gjørt henda úrdrátt úr direktivinum, grundaður á sannroyndirnar í marknaðarnevndini, og sum viðvíkja spurninginum um gagnnýtslu av ráevnunum í undirgrundini.

Henning Schmaltz-Jørgensen skrivar:

I forhold til EU har Danmark og Norge, hvis det bliver medlem, fået ensartede regler med hensyn at udvinde olie og gas. Disse regler blev vedtaget af EUs energiministre i december sidste år, og giver landene fuld ret til at bestemme om ressourcerne i undergrunden skal udbydes i koncession. De kan også selv bestemme hvilke områder der i givet fald skal udbydes og hvornår de skal udbydes.

Det er en aftale der er indgået mellem EUs energiministre under forhandlinger med Danmark og Norge, hvilket vil sige at reglerne er gældende for Danmark og derfor også vil blive det hvis Norge bliver medlem af EU. Det er helt op til de enkelte lande at føre deres egen politik på dette område.

Aftalen omfatter både efterforskning og produktion og betyder i praksis, at EU ikke kan blande sig hverken i Danmarks eller Norges udvinding af olie og gas.

Den eneste undtagelse i reglerne er, at staten ikke deltager i beslutningerne om, hvem der skal levere udstyr m.v. Denne begrænsning har Danmark accepteret.

### Færøerne har råstofloven

Tilsvarende vil komme til at gælde, hvis Færøerne i fremtiden bliver medlem. Så har Hjemmestyret ifølge råstofloven det fulde ansvar for undergrunden og kan selv lovgive og administrere som det ønsker uden indblanding fra regeringen i København eller kommissionen og ministerrådet i Bruxelles.

### Den norske stat bevarer rettighederne

Reglerne er meget detaljerede og ikke til at tage fejl af. De enkelte lande har selv ret til at forvalte olie- og gasforekomsterne, og EU kan ikke forhindre, at staten selv deltager i koncessionerne. Desuden har staten ret til at opkræve skat af produktionen.

Under forhandlingerne med Danmark og Norge blev der taget særligt hensyn til Norge og den betydning, som oliesektoren har for Norge som storproducent af olie. Nordmændene fik også disse regler med i tiltrædelsesaftalen, som de indgik med EU i marts i år.

Reglerne betyder, at staten i de to lande også i fremtiden kan gå aktivt ind i oliekonsortierne, og at staten har samme rettigheder og pligter som private, der får koncession. Staten er sikret i en sådan grad, at den kan blokere for beslutninger, der går imod dens egne interesser både politisk og økonomisk.

Aftalen indgår altså i det forhandlingsresultat som Norge opnåede ved sine forhandlinger i Bruxelles. Da aftalen var i orden sagde den norske energiminister Jens Stoltenberg, at Norge var tilfreds og at der var taget hensyn til de norske synspunkter. Den betyder, sagde han i Stortinget, at Norge har national råderet over olie og gas og at staten har ret til at deltage effektivt i olievirksomheden.



**Eingin annar enn føroyingar hava avgerðarrætt um virðini í føroysku undirgrundini, sjálvt um Føroyar gerast limur í Europeiska Samveldinum**

### A. P. Møller sikret

A. P. Møllers interesser i olieudvindingen i Nordsøen bliver også varetaget i aftalen. Den gældende aftale mellem selskabet og den danske stat varer til 2012. Hvis den skal forlænges, bliver det alene en sag mellem den til den tid siddende danske regering og selskabet, dvs. uden EUs indblanding m.h.t. koncession.

Miele
turkitrumla
Být snóramar um við eina hangikoyggju, so er ein meining í at hava snóratræ.
Køksmiðstøðin
á Hálsi - Tlf. 14949

# Telefonverkið tók nýggjan borðsal í nýtslu í gjár

Hereftir verður bíðitíðin, tá ringt verður Nummarkall, styttri. Samstundis verður møguleiki fyri nýggjari tænastu, nevniliga fyri telefonfundum, har sjey luttakarar kunnu verða við. Hetta hendir eftir at Telefonverkið í gjár tók fyrsta borðsalin av sínum slag í heiminum í nýstlu.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN



**Nýggi borðsalurin varð tikin í nýtslu í gjár, mikudagin. Kostnaðurin liggur um einar tvær milliónir krónur** *Mynd: Diml./Jens Kristian*

Tey hava arbeitt í fýra ár, starvsfólk á Telefonverki Føroya Løgtings, við ætlanum at nútímansgera borðsalin, ella telefonpultin, sum onkur rópar tað. Nú hann er tikin í nýtslu, kostar borðsalurin einar tvær milliónir krónur.

Nógvir hentleikar eru við nýggja borðsalinum. Í fyrsta lagi verður skjótari atborið, tá ringt verður nummarkall. Men nýggi borðsalurin ger eisini, at tað verður lættari og tryggari at skráseta telefongjaldið.

Jógvan Thomsen, verkfrøðingur á Telefonverkinum, sigur, at borðsalurin nú sjálvur skrásetur gjaldið fyri telefonsamrøðurnar, og sendir úrslitið beinleiðis inn í telduskipanina hjá telefonverkinum.

Í gamla borðsalinum varð gjaldið fyri samrøðurnar skrivað á pappír, og síðani tastað við hond inn í telduskipanina, sum síðani skrivaði rokningar út.

- Nýggja skipanin verður bæði minni arbeiðskrevjandi og tryggari, sigur Jógvan Thomsen.

### Telefonfundir

Møguleiki er fyri fleiri nýggjum tænastum við hesum nýggja borðsalinum. Serliga eru tað sonevndir telefonfundir, hugsað verður um. Jógvan Thomsen sigur, at møguleiki er at skipa so fyri, at sjey telefonfelagar kunnu verða á slíkum telefonfundi. Av teimum sjey kunnu fleiri verða staddir uttanlands.

Áðrenn telefonfund kunnu luttakandi felaganir gera av, hvussu telefonrokningin skal gjaldast. Til dømis kann ein fundarstjóri ella onkur av hinum einsamallur gjalda alt »gildið«. Men telefonrokningin kann eisini býtast millum allar fundarluttakararnar.

- Tað kann jú hugsast, at ein familja hevur hug at tosa í felag um eitthvørt, har onkur teirra er staddur uttanlands. Tey kunnu so sjálvi gera av, hvussu rindast skal, sigur Jógvan Thomsen.

Enn er tænastan við telefonfundum ikki tikin í nýtslu, men tað er lítið hugsandi, at tænastan ikki heilt skjótt verður veruleiki. So mikið stórur tikist áhugin fyri tænastuni at vera longu nú.



**Hesar taka telefonina, tá ringt verður til »Nummarkall«. Fýra terminalar eru í nýggja borðsalinum** *Mynd: Diml./Jens Kristian*

# Skipari og stýrimaður á Polar Sea lítla bót

Eftir tilmæli frá danska sjófartsstýrinum hevur fútin givið teimum báðum - skipara og stýrimanni á Polar Sea - ávikavist 3000 og 1000 krónur í bót.

Í longri tíð hevur Polar Seamálið verið til umrøðu í Danmark. Ein útskrift frá sjóforhoyrinum var send til danska sjófartsstýrið, so teir kundu koma við einum útspæli. Fútin hevur so fingið eitt tilmælið frá donsku serfrøðingunum, og teir meta tað ikki vera neyðugt at reisa ákæru móti nøkrum parti.

Í staðin fáa skiparin og stýrimaðurin eina lítla bót. Skiparin skal rinda 3000 krónur, meðan strýrimaðurin sleppur við gjaldi av 1000 krónum.



❑ Hverdag flutes 15 fyri.......... 13.25
❑ Karat kaffi 500 gr......... 19.95
Lion Bar 4x40 gr. 10.00
❑ Nemli' roulada 300 gr............ 8.95
❑ Taffel chips 250 gr............ 9.95
❑ Mazarin terta 290 gr............ 9.95
❑ Amo hveitimjøl 2 kg............ 12.95
❑ Ota solgryn 950 gr.......... 12.95
Rumbul ísur 3 sløg 2 ltr. 24.95
Kærgården 250 gr............ 6.75
❑ Nemli' Cornflakes 500 gr.......... 12.95
❑ Nemli' fersknir 850 gr............ 5.95
❑ Nemli' marmulada 900 gr.......... 12.95
❑ Nemli' toilettpappír 8 rll............ 12.95
❑ Nemli' køksrullur 4 rll............ 12.95
❑ Nemli' salami í stk. 700 gr......... 19.95
❑ Nemli' italiensk salat 300 gr............ 5.25
❑ Nemli' grillpylsur 10 fyri......... 13.95
❑ Kohave ostur 800/1000 gr. 33.95
❑ Emil ostur 600/700 gr. 25.95
❑ Bakaðir bønir 420 gr............ 3.25
RUMBUL
Klaksvík • Tórshavn • Saltangará
er bíligari!
Rugmjøl 2 kg................ 8.50
❑ Agurkusalat 720 gr............ 8.95
❑ Nemli' ketsjupp 1000 gr............ 9.95
❑ Nemli' skrúvur 500 gr............ 3.95
❑ Jolly Cola 1,5 ltr...+pant 11.95
❑ Nemli' bl. saft 1 ltr................ 7.95
Cadbury bisquits 4 sløg 3x150 gr. 20.00
Falke mjøl 2 kg. 4.95
❑ Sjov leskidrykkur 1/2 ltr.............. 9.95
❑ Coka Cola 1,5 ltr...+ pant 12.95
❑ Vita appilsinjuice 1 ltr................ 5.95
Ribena 1 ltr........... 27.95
❑ Malið neytakjøt 1000 gr...... 33.95
Fløde Havarti 400 gr. 12.95
❑ Mazola maisolja 1/2 ltr.......... 14.95
❑ Viscount mint 7 í pk. 1 pk fyri.......... 6.95
❑ Jaffa cake 3 pk. fyri..... 19.95
Opið er
Tórshavn/Saltangará: má-hó. kl.9.00-18.30 frí. kl.9.00-19.00 ley.kl.9.00-14.00
Klaksvík: má.-hó.kl.9.00-17.30 frí. kl.9.00-19.00 ley.kl.9.00-13.00

FARVE